HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

1. juli 2016
Mál: 16/00348-2

**Uppskot til***

**Kunngerð**
**um**
**endurvenjing innan sjúkrahúsverkið**

Við heimild í § 6a, stk. 4 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2015 verður ásett:

**§ 1.** Sjúkrahúsverkið veitir ókeypis endurvenjing til sjúklingar, sum hava læknafakliga grundaðan tørv á endurvenjing á sjúkrahúsi vegna skaða ella sjúku.
*Stk. 2.* Endurvenjing verður veitt, tá ið sjúklingur er innlagdur, men kann eisini verða veitt, tá ið sjúklingi tørvar ambulanta endurvenjing.
*Stk. 3.* Sjúkrahúsverkið kann, fyri at røkja sína skyldu sambært stk. 1, gera avtalur, m.a. um keyp av tænastum, við aðrar myndugleikar, stovnar og privatar veitarar.

**§ 2.** Endurvenjingin fevnir um miðvísa, tíðaravmarkaða og fyriskipaða venjing, sum hevur til endamáls, at sjúklingurin í størst møguligan mun kann endurvinna sínar mistu førleikar, bæði likamliga og sálarliga.

**§ 3.** Endurvenjing verður veitt, tá ið lækni hevur staðfest ein tørv á endurvenjing, og byrjar, so skjótt sum tað er ráðiligt í mun til heilsustøðuna hjá sjúklinginum.
*Stk. 2.* Endurvenjing varir í mesta lagi í 3 mánaðir. Í serligum førum kann tíðarskeiðið leingjast, soleiðis at endurvenjingin varar longur enn 3 mánaðir.
*Stk. 3.* Endurvenjingin endar, tá ið lækni hevur staðfest, at endurvenjing á sjúkrahúsi er liðug; tá ið tað er staðfest, at førleikin ikki kann endurvinnast, ella tá tíðin er lokin.

**§ 4.** Lækni tilnevnir eitt heilsustarvsfólk at hava ábyrgdina av at samskipa enduvenjingartilboðið til sjúklingin, tá ið endurvenjingartilgongdin byrjar á sjúkrahúsi.
*Stk. 2.* Heilsustarvsfólkið skipar fyri inn- og útskrivingarsamrøðum v.m., har avvarðandi heilsustarvsfólk, sjúklingurin og hansara avvarðandi luttaka. Heilsustarvsfólkið er sambindingarlið millum myndugleika og borgara, og millum sjúkrahúsverk og aðrar geirar.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

*Stk. 3.* Um mett verður, at sjúklingur hevur tørv á endurvenjing frá almannaverkið og/ella kommunum eftir útskrivan, luttaka, umframt tey í stk. 2 nevndu, samskipari á almannaverkinum og/ella kommunu í samskipandi samrøðum.

**§ 5.** Tá ið sjúklingur hevur tørv á endurvenjing frá almannaverkið og/ella kommunum eftir útskrivan, skal sjúkrahúsverkið bjóða sjúklinginum eina endurvenjingarætlan.
*Stk. 2.* Endurvenjingarætlanin skal verða skrivlig og skal verða gjørd í samráð við sjúklingin.
*Stk. 3.* Byrjað verður við at lýsa endurvenjingartilgongdina, ímeðan sjúklingur er innlagdur ella undir ambulantari endurvenjing.

**§ 6.** Í endurvenjingarætlanini skal í minsta lagi vera upplýst:
a) Sjúkrasøgan hjá sjúklinginum,
b) Frágreiðing um førleikar, herundir mistar førleikar hjá sjúklinginum,
c) Innihaldið í endurvenjingartilboðnum á sjúkrahúsinum,
d) Hvat endurvenjingin eigur at miða ímóti í ítøkiliga førinum,
e) Staðfesting frá lækna sambært § 3, stk. 3,
f) Hvør samskipar arbeiðið við endurvenjingini, smb. § 4,
g) Samtykki frá sjúklinginum til, at endurvenjingarætlanin kann latast øðrum viðkomandi myndugleikum

**§ 7.** Sjúklingurin skal í seinasta lagi við útskrivan av sjúkrahúsi ella tá ið ambulanta sjúkrahúsendurvenjingin er liðug, fáa endurvenjingarætlanina.
*Stk. 2.* Harumframt skal endurvenjingarætlanin, eftir avtalu við sjúklingin, latast avvarðandi kommunu, Almannaverkinum ella øðrum sjúkrahúsi, um endurvenjing skal halda áfram har.
**§ 8.** Um sjúklingur hevur rætt til endurvenjing eftir lokna viðgerð á sjúkrahúsinum, ella tá ið ambulant endurvenjing á sjúkrahúsinum er liðug, og tørvur er á framhaldandi samskipan, skal sjúkrahúsverkið samstarva við almannaverkið ella kommunurnar.
**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 1. juli 2016

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/Turid Arge